# Miðvikan

# Símun Jóhan Wolles seinasti av gomlu bátasmiðunum

**Mikudagin í seinastu viku andaðist Símun Jóhan Wolles av Eiði, 77 ára gamal. Við honum er ein stórur partur av okkara bátasøgu farin handan sýn saman við nógvari aðrari siðsøgu**

**1. partur**

Símun Jóhan var ein serstakur persónur. Hann visti so ótrúliga nógv. Men til alla lukku eydnaðist at fáa nokk so fitt av hansara vitan festa á blað. Eg var so heppin at vera ein teirra, sum kom at gera hetta møguligt. Tí er tað náttúruligt, nú hann er farin, at taka sumt av hesum fram aftur.

Fyrst skal verða greitt eitt sindur frá lívinum hjá Símun Jóhan.

Hann var ættaður av Trøllanesi, sonur Elspu f. Samuelsen, ættað úr Lorvík, og Óla Wolles í Uppistovu, sum er ognarleysa húsið á Trøllanesi. Tað kann verða nevnt, at ein ættarfaðir hjá Símuni Jóhan er tann frá Brillumanninum kendi Skipar Hansen.

Tá ið Símun Jóhan var 7 ára gamal, fekk hann ein lítlan beiggja, Helga. Fyri at lætta um hjá mammuni, varð Símun Jóhan sendur til Eiðis at vera hjá fastrini, Oluffu, og manni hennara, Jóhannes í Miklagarði. Annars vóru tey 8 systkin, so tað var nóg mikið at gera heima kortini. Lagnan vildi tað so, at Símun Jóhan kom at verða verandi á Eiði, og hann vaks upp sum sonur í húsinum í Miklagarði.

Góð hava evnini verið. Símun Jóhan dugdi longu at lesa áðrenn hann fór í skúla.

Hann kom nógv til Trøllanesar, har tey eisini »kannaðu« sær hann.

### Til skips við Júst

Hjá Símuni Jóhan gjørdist byrjanin av arbeiðslívinum tað vanliga sum hjá dreingjum tá í tíðini. Júst fyltur 15 ár fór hann til skips, fyrst við »Nøvuni«, fyrrverandi »Acorn.« Har var hann við í tvey ár og fór síðani við »Atlantsfarinum«, sum fastir hansara, Anna Isaksen, átti.

Símun Jóhan sigldi fitt við norðmonnum, sum nógvir eiðismenn gjørdu tá í tíðini. Hann var við línuskipinum »Brestir« við Júst í Túni fyrsta árið í 1957-58. Seinni var hann eisini tvey summur á nótaveiði við »Sildrekanum« hjá Júst, ið sum kunnugt var fyrsti føroyski skipari á nótaveiðu.

### Byrjaði at smíða bátar 12 ára gamal

Símun Jóhan fór ungur at smíða bátar. Hetta hevði hann ikki frá fremmandum. Fosturpápi Símun Jóhan var bátasmiður, og hann vildi leggja hetta í fostursonin, sum eisini dugdi at taka við. Longu 12 ára gamal smíðaði hann saman við vininum, Páll Mørkøre, sum doyði blaðungur, ein bát at spæla við hjá dreingjum. Tá ið hann var 14 ára gamal, smíðaði Símun Johan bátar saman við fosturpápanum.



*Marjun og Símun Jóhan við abbasoninum Símun Jóhan*



*Longu 14 ára gamal byrjaði Símun Jóhan av álvara at byggja bátar saman við fosturpápanum Jóhannes í Miklagarði*

Í 1960 byrjaði bátasmíðið av álvara. Símun Jóhan fór at smíða bæði einsamallur og saman øðrum bátasmiðum. Nakrar vetrar smíðaðu brøðurnir Andreas og Poul Jóhannes Poulsen frá Ljósá saman við honum. So róðu teir út um summarið.

Fyrsta árið varð smíðað úti. Men síðan varð smíðað í kjallaranum í »Mizpa«, samkomuhúsið hjá brøðrasamkomuni á Eiði.

At smíða bátar er eitt serligt kynstur. Her er einki við tekningum, sum arbeitt verður eftir. »Tekningarnar« liggja inni í høvdinum hjá hvørjum einstøkum bátasmiði. Tí eru bátarnir ymiskir – alt eftir hvør ið smíðar.

Tað kann nevnast, at tað er ikki bert í Føroyum, at bátasmíðið hjá Símuni Jóhan er kent. Fyri nøkrum árum síðan hevði hann ein amerikanara í »praktikk« í eitt ár, og er hesin nú førur fyri at føra júst bátarnar hjá Símuni Jóhan víðari handan hav. Eisini hevur hann smíðað bátar í Danmark millum annað á víkingabátasavninum í Roskilde.

Símun Jóhan eigur eisini eitt heilt fitt íkast í doktararitgerðini »Hin føroyski róðrarbáturin« hjá Andrasi Mortensen.

Tað var eisini so heppið, at Finnbogi Ísakson, sum var systkinabarn Símun Jóhan, fyri nøkrum árum síðani gjørdi eina sendirøð í sjónvarpinum av bátasmíðinum hjá Símun Jóhan Símun Jóhan.

Í 1982 hevði Símun Jóhan eisini eina drúgva grein um bátasmíð í Varðanum.

### Fróðarmaður var

Eitt sermerki fyri Símun Jóhan var, at hann var fróðarmaður. Hóast hann fór av Trøllanesi longu sum 7 ára gamal, so hevði hann tikið við sær ta serligu mentan, sum er eyðkend fyri eitt so lítið pláss. Fosturpápin Jóhannes hevur eisini verið ein fróðarmaður, sum hevur dugað væl at greiða frá. Væl hevur Símun Jóhan eisini dugað at sita undir. Hann kundi nógv ár aftaná greiða frá í smálutum tað, sum Jóhannes hevði sagt honum.

Minnið var framúr. Tað var ein hending á Trøllanesi, sum Símun Jóhan mintist, hóast hann bert var tvey ára gamal. Tað var í 1935, tá tann 18 ára gamli Jóhannes í Innistovu, datt oman, tá hann var og fleygaði. Henda hending var sjálvsagt ein ræðuligur hvøkkur fyri eina so lítla bygd, og tann ófrættadámur, sum fylgdi við, festi seg í minnið á Símuni Jóhan.

Í síni tíð var Símun Jóhan ein framúr stuðul hjá FF-blaðnum í tess roynd at festa á blað søguna hjá fiskimonnum og øðrum "vanligum" fólki. Veit, at hetta var tilfar, sum varð virðismett av mongum. Hetta er eisini komið við í Trøllanes- og Wollessøguna hjá systirsoninum Jákupi Andreassen.

### Pápi mátti konfirmerast fyri at sleppa til skips

Ein av frásøgnunum hjá Símun Jóhan var um pápan Óla Wolles:

»Fyrsti túrurin hjá pápa var við Húsaskonnartini, sum skipið »Marianna« varð kallað millum manna. Hann vildi til skips, men hann hevði ikki fingið prestsins hond á høvdið. Hetta forðaði honum eitt ár, men so vildi hann ikki bíða longur. Nú var hann á 16. ári. Tað var eingin prestur á Viðareiði um tað mundi, so okkurt mátti gerast. Abbi og pápi fóru so til gongu av Trøllanesi heim eftir oyggj. Á Blankskála var glaðað og kom langabbi, Óli í Uppistovu, yvir við báti eftir teimum úr Leirvík. So gistu teir har.

Her var tað pussiga samanfall, at bæði ættin av Trøllanesi og úr Leirvík var úr Uppistovu. Og Óla navnið var í báðum húsum.

Dagin eftir varð so farið til gongu út í skúlan í Saltnesi, har pápi gisti, meðan hann gekk til úti á Nesi saman við øðrum góðum garpum og gentum.

Millum konfirmantarnar var Bartal á Strondum.